FØROYA NÁTTÚRUGRIPASAVN / SØVN LANDSINS

# Lundi

## *Fratercula arctica grabae*

## Teljing í Mykinesi í 2013

Leivur Janus Hansen, Jóhannis Danielsen, Christina Joensen
og Sunniva S. Sigurdardóttir

**04-02-2014**



Í Juli og August vórðu lundaholur í Mykinesi kannaðar. Endamálið var at meta um hvussu nógvir ungar kundu koma undan í 2013. Men eins og í 2011 og 2012 var eingin livandi pisa at síggja í nakrari kannaðari holu.

## Endamál

Endamálið við teljingini er, at gera eina álítandi meting av talinum av búfuglum í lundastovninum í Mykinesi. Somuleiðis skal ein álítandi meting gerast um gongdina hjá hesum lundastovninum.

## Arbeiðsháttur

Mannagongdin, ið nýtt varð, er útgreinað í Lundi *Fratercula arctica grabae*: Fyribils mannagongd fyri teljing (Hansen, Simonsen, Olsen, & Hammer, 2013).

Holur vórðu kannaðar fyri at telja, hvussu nógvar pisur kundu væntast floygdar.

## Virksemi

Henda teljing verður fíggja í felag við drunnhvítateljingina í Nólsoy og tær verða samskipaðar. Í ár varð avgjørt einans at kanna holur og ikki telja nýggj øki, í Mykinesi í 2013.



MYND 1. Í LAMBA VÓRÐU REYÐU PUNTARNIR KANNAÐIR Í 2013.



MYND 2. Í DALINUM VÓRÐU REYÐU PUNTARNIR KANNAÐIR Í 2013.

Fyri hvønn punt á Mynd 1 og Mynd 2 varð kannað, um holur vóru í einum 30 $m^2$ rundingi í miðjuni. Í Juli og August 2013, varð kannað í hvønn mun holurnar høvdu verið nýttar (Talva 1). Tá verður hugt eftir, um mold liggur útfyri holuna, um grasið er traðkað frammanfyri, um skvettur sæst og so framvegis. Um ein hola sær út til at hava verið nýtt, so verður endoskopið nýtt til at vita, um pisa er í.

Í ár var mannagongdin nakað broytt, í mun til undanfarin ár. Higartil hava heilt fá økir verið kannað hvørt ár (fýra í 2011 og fimm í 2012). Hesi økir hava verið lutfallsliga stór (30 $m^2$). Í ár vóru økini minni (10 $m^2$) og talið av teimum var 27, tó í onkrum teirra var als eingin hola.



**MYND 3. Í 2013 VÓRÐU HOLUR Í DALINUM OG LAMBA KANNAÐAR.**

Í 2011 vórðu lundaholur taldar í Lamba og Dalinum, men ikki allar. Í 2012 vóru lundaholur taldar í Hólmi, Lamba og Dalinum. Í 2011, 2012 og 2013 varð meting gjørd av, hvussu nógvar pisur komu undan.

## Úrslit

**TALVA 1. Í 2011, 2012 OG 2013 VÓRÐU HOLUR KANNAÐAR. TÆR VÓRÐU SKRÁSETTAR SUM ÓBRÚKTAR, BRÚKTAR OG BRÚKTAR VIÐ LIVANDI PISU.**

| | Lamba | | | Dalurin | | | Hólmur | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Óbr. | Brúkt. | Pisa | Óbr. | Brúkt. | Pisa | Óbr. | Brúkt. | Pisa |
| **2011** | 93 | 56 | 0 | 97 | 44 | 0 | | | |
| **2012** | 43 | 99 | 0 | 42 | 74 | 0 | 14 | 18 | 0 |
| **2013** | 41 | 91 | 0 | 47 | 82 | 0 | | | |

Í 27 puntum vóru 261 holur. Av hesum bóru 173 tekin um brúk og vóru tískil kannaðar við endoskopi. Men í ongari var livandi pisa at síggja. 16 vaksnir lundar sæddir í holum, og 5 deyðar pisur.

Í 2011 vóru umleið 1/3 av holunum brúktar. Í 2012 og 2013 vóru tað umleið 2/3. Hóast samlaða talið av pisum hevur verið sera lágt, so hevur onkur verið, tí einstakir sildberar sóust á flogi.




**MYND 4. HOLUR, IÐ VÓRÐU BRÚKTAR, VÓRÐU KANNAÐAR VIÐ ENDOSKOPI.**

## Niðurstøður
Gongdin síðstu trý árini hevur verið sera neilig hjá lundanum í Mykinesi.

Hvørki í 2011, 2012 ella 2013 vórðu livandi pisur sæddar í holum, sum vórðu kannaðar. Tað merkir, at hóast onkur pisa varð floygd, so hevur talið í mesta lagið verið nakrar hundrað.



MYND 5. ONKUR EINSTAKUR SILDBERI VAR AT SÍGGJA Í 2013.

Ein mús sást í einari av kannaðu holunum og ein kanin sást í holum í Dalinum.



MYND 6. EIN KANIN HELT TIL Í LUNDALANDINUM.

## Tøkk

Jarðeigarar og fólk annars í Mykinesi skulu hava tøkk fyri hjálp og vælvild.

## Keldur

Hansen, L. J., Simonsen, W., Olsen, B., & Hammer, S. (2013). *Lundi Fratercula arctica grabae: Fyribils mannagongd fyri teljing*. Tórshavn.

## Dagbók

Við í verkætlanini vóru Leivur Janus Hansen, Jóhannis Danielsen, Sunniva Samson Sigurdardóttir og Christina Joensen.

### Mikudagur 31. juli

Kl. 10:20 fóru LJH, JD, CJ og SSS út til Mykines, og innaftur kl 17:05.

Lag var lagt á, og byrja varð at kanna holur í Dalinum.

### Mánadagur 5. august

Kl. 10:20 fóru JD og SSS út til Mykines, og innaftur kl 17:30.

Holur vórðu kannaðar í Lamba.

### Týsdagur 6. august

Kl. 10:20 fóru JD og SSS út til Mykines, og innaftur kl 17:30.

Holur vórðu kannaðar í Lamba.

### Fríggjadagur 9. august

Kl. 10:20 fóru JD og CJ út til Mykines, og innaftur kl 17:30.

Holur vórðu kannaðar í Dalinum.

### Aðrar dagar

Annað virksemi í samband við teljingar varð framt aðrar dagar.